## Stjórnmálafrøðingur

Á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum er eitt útbúgvingar- og granskingarstarv í stjórnmálafrøði leyst at søkja til setan frá 1. september ella skjótast gjørligt. Starvið er tíðaravmarkað til eitt ár.

Útbúgvingarparturin fevnir um fakliga samskipan av undirvísing fyri lesandi, ið taka bachelor-útbúgving í stjórnmálafrøði, og undirvísing í lærugreinum, sum eru partar av útbúgvingini. Útbúgvingin er nærri lýst á **http://www.setur.fo/documents/00496.pdf**

Granskingarparturin verður í stóran mun tengdur at serøki umsøkjarans.

Miðað verður eftir at seta fólk við lektaraførleika í stjórnmálafrøði ella nærskyldum fakøki, men aðrir umsøkjarar eru vælkomnir at søkja.

Løn og starvstreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar fáast við at seta seg í samband við megindeildarleiðaran Elin Súsannu Jacobsen, teldupostur elinsj@setur.fo ella tlf. 352583.

Umsóknir við ævilýsing (curriculum vitae), próvskjølum, viðmælum ella tilvísingum, serprentum og avritum av vísindaligum verkum mugu vera Fróðskaparsetrinum í hendi í seinasta lagi 25. juni 2007

Umsóknir skulu stílast til

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Fróðskaparsetur Føroya
J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272
FO 110 Tórshavn

TEAM85

## HANDILSLÆRLINGUR

Handilsfyritøkan Kaj Andreasen & Co er stovnað í Tórshavn í 1970. Fyritøkan útvegar maskinur og útgerð til byggivinnuna og útgerð til fiskiog alivinnuna, skip og bátar.

### Vit sóknast eftir handilslærlingi

Eitt spennandi starv, har viðkomandi við tíðini sleppur at royna seg innan vørukeyp, ger av tilboðum og sum heild vera ein partur av arbeiðinum at halda handilshølini snotulig.

Uppgávurnar koma at fevna um :
- Avgreiðslu av viðskiftafólki
- Røkt av handlinum
- Bílegging av vøru
- Annað fyrifallandi arbeiði

Tað er ein fyrimunur um umsøkjarin hevur áhuga og kunnleika til maskinur, men er hetta ikki eitt krav.

Um tú heldur, at hetta er nakað fyri teg, so send okkum umsókn við møguligum viðmælum.

DIMMALÆTTING 341200

**Kaj Andreasen & Co**

HEILSØLA - SMÁSØLA - UMBOÐ - ÚTLEIGAN

Brekkutún 7 - Postboks 1200 - 188 Hoyvík
tel 31 56 00 - fax 31 80 08

T-postur: info@andreasen.fo - Heimasíða: www.andreasen.fo

## Lærarastørv og størv sum stuðul í Fuglafjarðar skúla

**Hesi størv verða lýst leys til setanar:**

- **2 lærarar í fast starv frá 1. august 2007.**
- **3 lærarar í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2007/2008** fyri lærarar í farloyvi, lækkað tímatal, serligan tørv og avlopstímar.
- **1 lærari í tíðaravmarkað parttíðarstarv (uml. 0,75) frá 16. august til 12. oktober 2007.** Fyri lærara í farlovyi.
- **3 tíðaravmarkað parttíðarsstørv sum stuðul skúlaárið 2007/2008.** *Hesi 3 størvini eru 20 t/viku, 27 t/viku og 24 t/viku. Talan er um stuðul til næmingar, sum hava serligan tørv.*

**Søkt verður eftir lærarum, sum:**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- eru stundisligir og nærlagdir

**Harafturat skulu lærararnir hava førleika at átaka sær eina ella fleiri av hesum lærugreinum:**
- kristnikunnleika, føroyskum, donskum, enskum, støddfrøði, náttúru/tøkni, ítrótti, tónleiki, evning, handarbeiði, bókasavn og serligan tørv

**Førleikakrøv:**
Tey, ið verða sett í lærarastørvini, skulu hava læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum

Tey, sum verða sett í starv sum stuðul, skulu hava útbúgving sum námsfrøðingar ella samsvarandi førleika.

**Lønar- og setanartreytir:**
Lærarastørvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so, at tann, sum settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Tímatalið til eitt av tíðaravmarkaðu lærarastørvunum verður ikki endaliga ásett fyrr enn 1. september 2007.

Lærarastørvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4

Starvið sum stuðul verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir:**
Umsóknir við c.v. og ljósriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlastjóranum í hendi **í seinasta lagi mánadagin 18. juni kl. 10.00**

*Setanarsamrøður verða í døgunum 18. og 19. juni.*

Nærri kunning um størvini fæst við at ringja til Súna í Hjøllum, skúlastjóra, á tlf. 444087 ella 737761. Eisini ber til at senda teldupost til skúlastjóran: suni@ffs.fo

*Fuglafjarðar skúli hevur komandi skúlaár umleið 320 næmingar í 18 flokkum. Við skúlan fara at starvast 33 lærarar, 3 stuðlar, 1 skrivari, 1 húsavørður og 4-5 reingerðingarfólk.*
*Komandi skúlaár fer skúlin at arbeiða við at seta í verk fleiri menningarætlanir.*

*Áhugaði kunnu lesa meira um skúlan á heimasíðuni: www.ffs.fo*

**Fuglafjarðar skúli**
Postboks 9 • FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 444087 og 737761

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN



## søkir eftir lærarum

Okkum tørvar 4 lærarar í august 2007. Talan er um føst størv á:

- Maskindeildini
- Bildeildini
- Eldeildini
- Trædeildini

**Vit vænta, at tú hevur:**
- sveinabræv innan økið
- evni og hegni at arbeiða við ungdómi
- viðkomandi starvsroyndir
- hollan og dagførdan kunnleika innan økið

Fyrimunur er, um tú hevur víðari útbúgving, teldukunnleika og førleika at undirvísa í alm. lærugreinum.

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi og avbjóðandi starv, saman við royndum starvsfeløgum
- møguleika fyri dagføring og eftirútbúgving innan økið
- løn sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

**Tú:**
skal senda umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndum innan 7. juni 2007 til:

Tekniska Skúlan í Tórshavn, Postrúm 3239, 110 Tórshavn

Um tú vilt vita meira um starvið, kanst tú ringja á tlf. 308050 og spyrja eftir:

- **Helga Mortensen**, deildarleiðara á maskindeildini
- **Eirik Ó. Simonsen**, deildarleiðara á bildeildini
- **Jógvan Sørin Hansen**, deildarleiðara á eldeildini
- **Atla Poulsen**, deildarleiðara á trædeildini,

Størvini, sum umfata undirvísing av maskinsmiðum, bilsmiðum, el-lærlingum, timbur- og snikkaralærlingum, skulu setast 9. august 2007. Fyrstu 2 árini eru royndartíð, har tú, sum settur/sett verður í starv, má vera til reiðar at taka ta eftirútbúgving, tað verður seg námsfrøðiliga ella aðra førleikagevandi útbúgving, sum er neyðug fyri at verða settur/sett í fast starv.

**Maskindeildin** tekur sær av undirvísing av maskinsmiðum og SIT-næmingum. Á deildini starvast 6 lærarar og ein verkvørður

**Bildeildin** tekur sær av undirvísing av bilsmiðum og SIT-næmingum. Á deildini starvast 4 lærarar og ein verkvørður.

**Eldeildin** tekur sær av undirvísing av el-lærlingum og SIT-næmingum. Á deildini starvast 5 lærarar og ein verkvørður.

**Trædeildin** tekur sær av undirvísing av timbur- og snikkaralærlingum og SIT-næmingum. Á deildini starvast 7 lærarar og ein verkvørður.

Eisini undirvísa lærararnir á eftirútbúgvingarskeiðum og teimum víðari útbúgvingum, sum skúlin hevur.